# Mary og Fríðrikur fingu ein son

NÝGGJUR PRINSUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Leygarnáttina klokkan 01.57 danska tíð fekk Danmark ein nýggjan krúnprins. Hann vigaði 3500 gramm og var 51 sentimetrar langurFøðingin gekk væl og tað gingu umleið tíggju tímar frá, at verkirnar byrjaðu til, at prinsurin var føddur. Mary fekk eina epidural blokadu, fyri at minka um pínuna, hetta fekk prinsessa Alexandra somuleiðis, tá hon átti sínar synir.

Sambært serfrøðingi hjá Danmarks Radio, verður hetta ivaleyst trendsetandi, og hetta kann merkja, at epidural blokadur vera brúktar uppaftur meira í framtíðini.

### Prinsur við hári

Sambært Morten Hedegaard professara á Ríkissjúkrahúsinum, ið var við undir føðingini gekk alt



væl.

Bæði mamma og barn høvdu tað gott undir allari føðingini, ja, sjálvt Fríðrikur krúnprinsur hevði tað gott alla tíðina segði Morten Hedegaard.

Hedegaard visti eisini at siga, at prinsurin varð føddur við hári á høvdinum, og helt at talan var um eitt sera vakurt barn.

### Ein lukkuligur prinsur

Fríðrikur krúnprinsur var sera glaður á at líta á tíðindafundinum, ið hann helt beint áðrenn hálvgum niggju leygarmorgunin. Hann var móður, men segði seg vera sera ernan av konu síni, ið hevði klára hetta sera væl. Hann helt sjálvur, at hann hevði verið ein góður stuðul hjá krúnprinsessuni og hevði gjørt sítt fyri at hjálpa.

Hann segði, at hetta ikki var nakað man kundi fyrireika seg til, men man mátti bara lata føðingina ganga sína gongd. Hann greiddi frá, at hann hevði klipt nalvastreingin. Løtan hevði sambært prinsinum verið sera kensluborðin, og hann viðgekk, at hann hevði grátið, hetta var ikki løtan at spæla superman, segði hann.

### Líkist einum nýføðingi

Tá miðlarnir royndu at fregnast um hvørjum nýggi prinsurin líktist, svaraði Fríðrikur, at hann líktist einum nýføðingi.

Fríðrikur segði eisini, at Mary var so smátt farin at leggja prinsin til. Men at higartil svav hann fyri tað mesta. Hann veit ikki, hvat hann hevur í væntu, smílti Fríðrikur, áðrenn hann skundaði sær uppaftur til konuna og sonin.

# Heilsanir úr øllum heiminum

Í sambandi við at Krúnprinsessa Mary hevur átt ein son, eru heilsanir úr øllum heiminum komnar til danska kongshúsið, millum annað hevur John Howard forsætismálaráðharri í Avstralia sent eina barnabók, og eina sjónvarpsheilsan til prinsin og foreldrinini.

Eisini úr Føroyum eru heilsanir komnar. Løgmaður hevur sent krúnprinsahjúnunum og kongshúsinum heilsan, har hann vegnað landsstýrið og alt Føroya fólk, ynskir Krúnprinsahjúnunum hjartaliga tillukku við soninum.

Grønlenski lanstýrisformaðurin Hans Enoksen, hevur vegna grønlendska landstýrið sent eina heilsan Landsstýrisformaðurin sigur, at lanstýrið gleðist um boðini, at ein nýggjur trúnarvingur er føddur, og at móður og barn hava tað gott.

Eisini danski statsministarin Anders Fogh var kvikur við eini heilsan, har hann vegna danska fólkið ynskti teimum tillukku.

Í tí sokallaða "Det gule Palæ" við Amalienborg ber til at bera gávir til nýfødda prinsin. Sambært Ekstra Bladet hevur prinsurin leygardagin og sunnudagin fingið 400 gávur, og fleiri hundra brøv og blómutyssi. Í nógvu pakkunum, er alt ímillum himmal og jørð, alt frá barnabókum og bamsum til ein barnavogn og leikur.

**nud**

# Hann skal eita Christian

**Tað tykist greitt, at tann lítli prinsurin fær navnið Christian eftir oldurabbanum, men stórur ivi er um hini nøvnini**

PRINSURIN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fríðriki krúnprinsi og Mary krúnprinsessu nýtist ikki at hyggja í navnabókina fyri at finna navnið til tann lítla sonin, tí tað er mest sum avgjørt frammanundan, at hann skal eita Christian.

Seinastu nógvu øldirnar hava teir donsku kongarnir itið annaðhvørt Christian ella Fríðrikur, seinast Christian 10. og Fríðrikur 9. So kom Margretha drotning inn ímillum. Var hon drongur, hevði hon itið Christian, og so skuldi ein kanska trúð, at hon valdi at geva eldra syni sínum tað navnið. Men tað gjørdi hon ikki, tí so hevði ólag komið í raðfylgjuna. Núverandi krúnprinsurin fær kongsnavnið Fríðrikur 10., og so stendur aftur á jøvnum ímillum tey bæði kongsnøvnini. Í hvussu er til tann næsta Margretha kemur.

### Trý afturat

Kongar og drotningar hava sum kunnugt fleiri nøvn, og í Danmark rokna tey serkønu við, at tann lítli prinsurin skal hava fýra nøvn t.v.s. trý afturat Christiani. Men hvørji tey vera, veit eingin við vissu enn.

Gitingarnar og uppskotini eru mong. Tey serkønu í kongsviðurskiftum vænta, at hann fer at eita Fríðrikur eins og pápin, og so vænta tey eisini, at hann fer at eita Henrik ella kanska Henri eftir abbanum á Amalienborg. Hinvegin vænta tey ikki, at hann fer at eita John eftir skotska abbanum. Tey vísa á, at synirnir hjá Joakim og Alexandru eita ikki eftir pápa hennara, og so er tað heldur ikki siður í danska kongshúsinum at kalla børnini upp eftir pápanum hjá mammuni. Í so máta er Fríðrikur krúnprinsur eitt undantak.

Avstralski forsætisráðharrin, John Howard, hevði onga viðmerking, tá hann bleiv spurdur, hvussu prinsurin skal eita, tí tað er ein spurningur, sum foreldrini skulu taka støðu til, helt hann. Harafturímóti hava nógvir avstraliumenn stóran áhuga í spurninginum, og tey flestu tykjast halda, at hann eigur at fáa eitt enskt navn so sum Curtis ella Peter.

### Grønlendskt ella føroyskt

Í Grønlandi bíða fólk eisini við spenningi eftir, hvussu prinsurin fer at eita. Tað kemst av, at Fríðrikur krúnprinsur er sera nógv avhildin í Grønlandi, eftir at hann ferðaðist tvørtur um innlandsísin. Krúnprinsurin hevur heldur ikki dult fyri, at hann kennir seg hava eitt serligt tilknýti til Grønland. Tí halda fleiri grønlendingar, at tann lítli eigur at fáa eitt grønlendskt navn, og tað sama halda í hvussu er summir danir.

Føroyingar noyðast helst at ásanna tann veruleika, at sannlíkið fyri einum føroyskum kongsnavni er ikki serliga stórt. Annars kundi eitt navn sum Jógvan verið hóskandi. So hevði eingin í hvussu er verið í iva um, hvat land tann lítli hevur samband við. Og so hava vit tann fyrimun fram um grønlendingar, at vit eiga eitt næstan túsund ára gamalt kongsnavn at vísa teimum á.

Margretha drotning eitur millum annað íslendska navnið Álfhildur. Tá var Ísland partur av ríkisfelagsskapinum, so kanska fær tann lítli prinsurin eitt grønlendskt ella kanska føroyskt navn. Men íslendingar slitu ríkisfelagsskapin stutt eftir, so kanska hugsar kongshúsið seg betur um hesaferð.

Hvussu er og ikki, so fáa vit væntandi svarið um ein mánað ella so, tá tann lítli prinsurin fer til dópin. Summi av teimum kongskønu halda, at tað verður í Holmens Kirke, har bæði pápin og omman vórðu doypt, men onnur halda, at hann fer til dópin í Vor Frue Kirke.

# Pressuverkir í ein mánað

Pressuverkir kalla tey tað, øll tann danska pressan og nakað av tí avstralsku stóð alt fríggjakvøldið og leygarnáttina uttan fyri Ríkissjúkrahúsið, og eitt lítið bil aftan á, at Ritzau visti at siga, at føðingin var farin í gongd, visti heimasíðan hjá BT at siga, at nú var arvingurin komin í heimin. Hetta var kl. 22 fríggjakvøldið, fleiri tímar áðrenn prinsurin varð føddur. Men tað var kanska ikki so løgið eftirsum miðlarnir høvdu havt pressuverkir síðan prinsessan var innløgd við plukkverkum miðskeiðis í september.

Mary sjálv hevði ikki so nógvan skund leygarnáttina kl. 01.57 hetta var góðar tvær vikur, áðrenn hon var sett at eiga og tað verður roknað sum vanlig tíð.

# Kanónir, bál, ljós og fløgg

Um alt Danmark vóru leygarkvøldið tendraðir vareldar, 200 bál brendu um alt landið fyri at hátíðarhalda, at ein nýggjur prinsurin var føddur. Hetta er gamal siður og bálini hava í Danmark eins og í Føroyum verið brúkt til at bera boð úr býi til bý. Á sjónum tendraðu 32 donsk herskip ljóskastararnar og bóru soleiðis eisini boðini á sjógvi.

Leygardagin á miðdegi var skotið við kanónum á Krúnborg slot og Hjá Batteriet Sixtus á Holminum í Keypmannahavn 21 ferð. Samstundis vóru fløgg vundin á fulla stong á øllum almennum bygningum, og bussarnir flaggaðu. Eisini í Grønlandi varð skotið við kanónum í kolinihavnini í Nuuk eisini her vóru 21 skot skotin.

Føroyingar hátíðarhildu somuleiðis dagin, og landið var flaggskrýtt við Merkinum og Danebrog.

**nud**